## Semja millum
## Felag Tænastumanna Landsins og Fíggjarmálaráðið

**Avtala**
Vísandi til § 31 í tænastumannalógini er gjørd henda avtala.

**1. Lønarhækkan:**
1.oktober í 2017 hækkar mánaðarlønin 2,3 %
1.oktober í 2018 hækkar mánaðarlønin 2,5 %

**2. Protokolat um innanhýsis vaktarskipan á fiskiveiðueftirlitinum:**
Hetta er hjálagt sum skjal 1.

**3. Avtala um tænastuferðir:**
Nýggj avtala er gjørd um tænastuferðir. Henda er hjáløgd sum skjal 2.

**4. Innleiðandi orðing í Arbeiðstíðaravtaluni:**
"Avtalan er um viðurskifti hjá tænastumonnum og starvsfólki við tænastumannalíknandi setan við ásettari arbeiðstíð, har arbeiðið regluliga liggur uttan fyri vanliga arbeiðstíð, t.e. tollarar og vaktgangandi á MRCC-støðini."

**5. Broyting av vikuskifti í § 4 í Arbeiðstíðaravtaluni:**
"Fyri arbeiði í vikuskifti, frá fríggjadegi kl. 16 til mánamorgun kl. 8, og á føstum frídøgum, frá kl. 0.00 til kl. 24, verður lati vaktargjald 2 eyka um tíman."

**6. Um eyka tilkallivakt í Arbeiðstíðaravtaluni:**
Nýtt § 7, stk. 7:
"Tá arbeiðsgevari biður fólk, sum sambært vaktarætlan hava frí, taka eina eyka tilkallivakt, og har minni enn 24 tímar eru til vaktin byrjar, verður dupult vaktargjald latið. Vaktargjaldið kann tó ongantíð vera hægri enn dupult vaktargjald 1 ella 2.
Í skipanini av tilkallivaktunum verður miðjað ímóti, at vaktinar yvir árið vera javnt býttar millum starvsfólkini, sum luttaka í skipanini."

Lønartalvan er dagførd eftir omanfyristandandi.

*Tórshavn tann 20. august í 2018*

| *Felag Tænastumanna Landsins* | *Fíggjarmálaráðið* |
|---|---|
| Meinhard Gaardlykke, formaður | Kristina Háfoss, Fíggjarmálaráðharri |
| | Jan Mortensen, lønarstjóri |

**Skjal 1:**

**Protokollat**
**Í sambandi við semju millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið**

Um arbeiðsviðurskifti hjá vakt gangandi á Fiskiveiðieftirlitinum

Protokolat um innanhýsis vaktarskipan hjá fiskiveiðueftirlitinum, uttanfyri vanliga arbeiðstíð:

1. Fyri at svara telefon (og annars móttaka og svara boðum) fær persónurin á vakt vaktargjald pr. tíma, men ikki yvirtíð ella aðra skrásetta tíð. Vaktargjaldið er tað sama sum ásett er í Arbeiðstíðaravtaluni millum Felag Tænastmanna Landsins og Fíggjarmálaráðið um tollarar og vaktgangandi á MRCC.

2. Persónurin á vakt arbeiðir 2 tímar leygardag og 2 tímar sunnudag. Viðkomandi fær yvirtíðarløn fyri hesar tímarnar. Sama er galdandi fyri fastar frídagar eftir §8 í umrøddu arbeiðstíðaravtaluni.

Tórshavn 20-08-2018

Tænastumannafelag Landsins
Fíggjarmálaráðið

Meinhard Gaardlykke, formaður
fíggjarmálaráðharri

Kristina Háfoss,

Jan Mortensen, Lønarstjóri

Skjal 2:

# AVTALA UM TÆNASTUFERÐIR

## *Almennar reglur*

**§ 1.** Avtalan er galdandi fyri tænastumenn og tænastumannalíknandi sett, sum starvast hjá landinum.
*Stk. 2.* Avtalan ásetur, hvussu útreiðslur, ið standast av einari tænastuferð, verða endurrindaðar.

**§ 2.** Talan er um tænastuferð, tá ið ferðin er ein neyðugur liður í tænastuni, og tænastustaðið hevur góðkent ferðina sum eina tænastuferð.

**§ 3.** Tænastustaðið leggur tænastuferðina til rættis, í samráð við starvsfólkið, og ger m.a. av, hvussu ferðast skal, og um starvsfólk skal liggja nátt á fyribils tænastustaðnum, ella um ferðast skal aftur og fram sama dag.
*Stk. 2.* Leingir arbeiðsgevarin tænastuferðina, verða eyka dagar roknaðir sum arbeiðsdagar við 8 tímum hvør. Endurgjald verður veitt fyri útreiðslur, ið standast av tí.
*Stk. 3.* Leingir starvsfólkið tænastuferðina, verða eyka dagar roknaðir sum feriudagar. Endurgjald verður ikki veitt fyri útreiðslur, ið standast av tí.

**§ 4.** Roknað verður frá fasta tænastustaðnum, tá ið gjørt verður upp, hvussu long ferðin er, og hvussu leingi, hon varir.
*Stk. 2.* Eru rímiligar grundir til tess, kann verða roknað frá øðrum stað, t.d. frá bústaðinum.

**§ 5.** Neyðugar, tænastuliga grundaðar útreiðslur, sum eru ikki umrøddar í hesari avtalu, verða endurrindaðar móti skjalprógvi.

**§ 6.** Er skjalprógv burturmist, ella ikki er at fáa, kann endurrindan í serligum føri verða latin móti váttan, ið er undirskrivað.

## *Tíma- og dagpengar*

**§ 7.** Tíma- og dagpengar, sum eru ásettir í § 15, eru ætlaðir at gjalda fyri útreiðslur til máltíðir og smáttaríir.
*Stk. 2.* Fyri tænastuferð í Føroyum verður goldið dag- og tímapeningur. Dagpengar verða goldnir fyri hvørjar fullar 24 tímar, sum tænastuferðin varir. Fyri hvønn byrjaðan tíma eftir hetta verður goldin tímapeningur.
*Stk. 3.* Fyri tænastuferð uttanlands verður goldið dagpeningur fyri hvønn byrjaðan dag, sambært § 15.
*Stk. 4.* Fær starvsfólk fríar máltíðir í sambandi við tænastuferðina, verða dag- og tímapengarnir minkaðir við ávikavist 30% fyri døgurða og 30% fyri nátturða.
*Stk. 5.* Er tænastuferðin í Føroyum byrjað eftir klokkan 7 og endað fyri klokkan 19 sama dag, verða ikki goldnir tímapengar. Rímiligar útreiðslur til mat o.a. vera endurgoldnar móti skjalprógvi.

**§ 8.** Á tænastuferð uttanlands verða dagpengarnir minkaðir við einum triðingi eftir 28 dagar.

*Stk. 2.* Á tænastuferð uttanlands kunnu tíma- og dagpengarnir í heilt serligum førum verða minkaðir, um tað er sjálvsagt, grundað á serlig viðurskifti á tænastuferðini, at vanligir tíma- og dagpengar eru hægri enn enn tær veruligu útreiðslurnar.

**§ 9.** Á feriudøgum og øðrum frídøgum, sum verða hildnir saman við tænastuerðini, fellur rætturin til endurgjald eftir § 7 tó altíð burtur.

***Útreiðslur til flutning***

**§ 10.** Á tænastuferð skal fyri tað mesta verða brúkt alment flutningsfar.
*Stk. 2.* Tænastustaðið kann loyva, at annað samband verður brúkt, tá ið tað eftir eini heildarmeting verður mett at vera best fyri tænastustaðið, t.d. *Airport Shuttle*-skipanin.
*Stk. 3.* Tænastustaðið kann eisini loyva, at starvsfólk brúkar egnan bil. Tá fær starvsfólkið endurgjald sambært reglunum um endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum, tó í mesta lagi tað, sum alment ferðasamband, ella líknandi tænastur sum t.d. *Airport Shuttle*-skipanin, hevði kostað.

**§ 11.** Starvsfólk fær endurrindað flutningsútreiðslur, sum standast av tænastuferðini.
*Stk. 2.* Allar útreiðslur til almenn flutningsfør og eftir umstøðunum til hýruvogn verða endurrindaðar móti skjalprógvi.
*Stk. 3*. Fyri nýtslu av egnum bili á tænastuferð verður víst til galdandi rundskriv. Nýtsla av egnum bili í útlondum er fevnt av sama rundskrivi.

***Útreiðslur til gisting***

**§ 12.** Skjalprógvaðar útreiðslur til hotellkamar ella aðra gisting, sum tænastustaðið hevur góðkent, verða endurgoldnar við í mesta lagi teirri hotelldispositiónsupphædd, ið er ásett í § 15.
*Stk. 2.* Í serligum føri kann tænastustaðið góðkenna hægri útreiðslur til hotell enn ta í § 15 ásettu.
*Stk. 3.* Á tænastuferð til lond, har ikki er ásett hotelldispositiónsupphædd, verða rímiligar útreiðslur til hotellkamar ella aðra góðkenda gisting endurgoldnar móti skjalprógvi.

**§ 13.** Ferðast starvsfólk saman við fólki, ið ikki er partur av tænastuferðini, t.d. maka, verða útreiðslur til hotellkamar endurgoldnar við í mesta lagi teirri upphædd, ið gistingarkostnaðurin fyri starvsfólkið hevði verið.

**§ 14.** Verður gistingarútreiðslan ikki endurgoldin móti skjalprógvi, sbr. §§ 12-13, verður latin náttarviðbót.
*Stk. 2.* Skipar tænastustaðið fyri gisting, ella endurrindar tænastustaðið útreiðslur eftir § 15, kann ikki samstundis verða latin náttarviðbót.

***Reguleringar o.a.***

**§ 15.** Dagpengaupphæddir og náttarviðbótin er ásett soleiðis:

Tímapeningur kr. 15,00
Fullur dagpeningur kr. 250,00
Hartil verður veitt náttarviðbót eftir rokning, tó í mesta lagi kr. 1.100,00
Náttarviðbót, ikki skjalprógvað kr. 230,00

*Stk. 2.* Fyri tænastuferðir til Danmarkar er dagpeningurin kr. 360 um dagin

*Stk. 3.* Hotelldispositiónsupphæddin, smb. § 12, stk. 1, er tann sama sum í danska satsregulerings-rundskrivinum.

*Stk. 4.* Á tænastuferð í øðrum londum, har eingin dagpengaupphædd er ásett omanfyri, verða goldnir dagpengar eftir donsku satsunum fyri viðkomandi land.

**§ 16.** Á tænastuferð uttanlands verða teknaðar tryggingar eftir galdandi reglum.

***Gildiskoma***

**§ 17.** Henda avtala kemur í gildi tann 1. november 2018

*Tórshavn tann 20. august í 2018*

*Felag Tænastumanna Landsins*

Meinhard Gaardlykke, formaður

*Fíggjarmálaráðið*

Kristina Háfoss,
fíggjarmálaráðharri

Jan Mortensen, lønarstjóri